


**Eilen Anthoniussen** eilen@sosialurin.fo

**Her arbeiði eg** er summartema í Sosialinum. Komandi átta vikurnar fara vit at prenta eina søgu um fólk og teirra ymisku arbeiðspláss

# Tær hava vaskað seg á rætta hill

**Fyri skjótt átta árum síðan fór Kirsten Jacobsen undir at stovna sítt egna virksemi. Eftir at hava roynt ymiskt fyrifallandi arbeiði, valdi hon at brúka alla sína tíð til at gera reint fyri fólk. Fyri einum ári var tað vorðið so mikið rúgvismikið, at hon avgjørdi at seta ein dagligan leiðara í starv. Leiðarin hevur eisini roynt alt møguligt, men líka sum Kirsten, kennir hon at hon loksins er komin á røttu hill**





*– Eg haldi tað vera spennandi at fara út til eina uppgávu. At koma inn og hyggja eftir hvat skal gerast. Og uppgávurnar kunnu vera sera ymiskar. Tað kann vera alt frá at vaska umborð á skipum, vit hava til dømis verið uppi í høgum stilladsum og staðið fastar í skaktum, sigur Agnas T. Olsen, dagligi leiðarin í Dveylan*

Dveylan er uttan iva Føroya mest hugnaligа arbeiðspláss. Í heiminum hjá Kirsten Jacobsen við J.C. Svabosgøtu í Havn finst skrivstovan hjá Dveyluni. Dveylan er ein reingerðingsfyritøka, sum síðan stovnan í 2001, hevur vaksið seg frá at hava eitt fólk til at hava ikki minni enn 27 fólk á lønarlistanum.

– Tað byrjaði við, at eg varð biðin um at koma at renovera linoleumsgólv við nýggjum reingerðingsvørum úr Noreg. Vit reinsaðu eisini teppi. Eftir eina tíð tók hin parturin seg úr samstarvinum, og eg stóð einsamøll, greiðir Kirsten Jacobsen frá.

Hon hevði kortini ongan hug til at venda aftur til gomlu tilveruna, har hon hevði skift millum ymisk arbeiði sum at passa børn, arbeiða í handli, skrivstovu og so framvegis.

– Eg valdi í staðin at halda fram, og so havi eg stríðst og knoklað, og við tíðini hevur tað bara vundið upp á seg. Nógv høvuðsreingerðing kom afturat, og eg havi fingið nógv føst viðskiftafólk, bæði millum privat og fyritøkur, sigur Kirsten Jacobsen.

## Junglutrummurnar besta lýsing

Dveylan er upprunaliga eitt kallkynsorð. Kirsten fann orðið í eini orðabók, tá hon leitaði eftir einum orði fyri moppu. Ein dveylur er ein kustur ella moppa, sum fyrr í tíðini vanliga varð brúktur umborð á skipi.

– Eg broytti tað so bara til eitt kvennkynsorð, og gav fyritøkuni navnið Dveylan. Tað ljóðar meir feminint, heldur Kirsten fyri.

Dveylan hevur ikki brúkt nógvan pening til marknaðarføring..

– Tað hevur ongantíð verið neyðugt. Vit hava bara brúkt junglutrummurnar, og tað hevur víst seg at vera ivaleyst, sigur Agnas T. Olsen, sum fyri einum ári síðan varð settur sum dagligur leiðari í fyritøkuni.

Tað kemst av, at arbeiðið var vorðið so rúgvismikið, at tað gjørdist ov nógv fyri Kirsten Jacobsen. Hon vildi eisini hava frí onkuntíð, og avgjørdi tí at seta eitt fólk afturat. Agnas T. Olsen fekk ábyrgdina av at taka sær av øllum samskifti í samband við bílegging av vaskiarbeiði. Tær eru kortini felags um at taka sær




*Dveylan er upprunaliga eitt kallkynsorð. Kirsten fann orðið í eini orðabók, tá hon leitaði eftir einum orði fyri moppu. Ein dveylur er ein kustur ella moppa, sum fyrr í tíðini vanliga varð brúktur umborð á skipi*